LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Click here to enter text.

Tórshavn, tann: 9. juni 2023
J. nr.: 23/12255
Viðgjørt: GMN

Svar upp á
Skrivligan fyrispurning nr. 52-112/2022 eftir tingskipanini § 52 a til Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismanni frá Honnu Jensen, løgtingsmanni um integratiónslóg.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvussu gongur at fyrireika lógaruppskot um integratión?
2. Hvørjir eru týdningarmestu tættirnir, sum ein slík lóggáva eigur at fevna um?
3. Hvørjar eru størstu avbjóðingarnar at skipa ein heildarkendan føroyskan politikk á útlendingaøkinum?
4. Nær væntast lógaruppskotið at vera klárt at bera í Løgtingið?
5.

Svar

Til spurning 1
Fyrrverandi landsstýrið gjørdi eitt uppskot til integratiónslóg. Hetta uppskotið náddi tó ikki at verða lagt fyri Løgtingið. Ætlanin er at arbeiða víðari við tí uppskotinum.

Eg haldi, at tað hevur týdning at hoyra, hvat viðkomandi partar hugsa um økið. Ætlanin er at hava fundir við hesar partar, áðrenn uppskotið verður lagt fyri Løgtingið, soleiðis at økið er lýst so væl sum gjørligt, áðrenn uppskotið skal viðgerast av Løgtinginum.

Ætlanin er at uppskotið verður lagt fyri Løgtingið í komandi tingsetu.

Til spurning 2
Tá tosa verður um tilflyting til Føroyar, er í høvuðsheitum talan um 3 bólkar:

- Útlendingar sum verða familjusameind
- Útlendingar sum koma til Føroya at arbeiða
- Flóttafólk

Hesir bólkar hava ymiskan tørv og integratiónslógin má taka hædd fyri hesum.

Høvuðsdenturin í integratiónslógini eigur at leggjast á tey, um hava ætlan at verða verandi í Føroyum. Lógin eigur at fevna um tilboð og krøv um frálæru í føroyskum. Um krav skal setast um málsligar førleikar og kunnleika til føroyska samfelagið í samband við varandi uppihaldsloyvi, so er neyðugt at tilboðið er sett soleiðis saman, at øll hava møguleika at luttaka. Hetta krevur t.d. at hædd verður tikið fyri fólkum sum sigla og arbeiða skiftisarbeiði.
Eisini er neyðugt at kunna verður væl um rættindi og skyldur í føroyska samfelagnum. Tí eigur lógin av fevna um ymisk integratiónsátøk.
Umhugsast eigur eisini hvussu føroyska samfelagið fær gagnnýtt vitan og útbúgving hjá útlendingum fult út.
Tað kann eisini hava stóran týdning at duga føroyskt mál og kenna rættindi og skyldur hjá útlendingum, sum koma til Føroyar at arbeiða. Hetta kann eitt nú hava týdning í mun til trygd á arbeiðsplássinum. Tað er eisini ein sannroynd, at nógv sum koma til Føroyar at arbeiða, seinni velja at blíva verandi. Tí eigur hesin bólkurin eisini at fáa tilboð um m.a. málfrálæru.
Tá tað kemur til flóttar, so er ætlanin at tey skulu aftur til sítt heimland, tá ið hetta er gjørligt. Eingin veit tó, hvussu leingi hetta kann verða, og tað gevur tí meining at bjóða integratiónsfremjandi tiltøk til henda bólk.
Fyri allar bólkar, er tað serliga týdningarmikið at tryggja, at børn og ung sum koma til Føroya, fáa góða málfrálæru og verða integreraði í føroyska samfelagið. Um tey ikki læra mál og siðir, kann tað ganga út yvir trivnaðin. Hetta kann fáa óhepnar avleiðingar fyri alt samfelagið í longdini.
Yvirskipa kann sigast, at ein integratiónslóg eigur at fevna um málfrálæru, kunning og ymisk integratiónstiltøk.

Til spurning 3
Um man skal fáa ein heildarkendan politikk á økinum er neyðugt at inndraga allir viðkomandi partar í arbeiðnum. Tað vil siga, at land, kommunur, arbeiðsgevarar og fakfeløg mugu seta seg saman og finna loysnir, sum hóska til føroyska samfelagið.

Til spurning 4
Miða verður eftir at bera uppskotið í Løgtingið komandi tingsetu. Týdningarmikið er at fáa lýst málið út í æsir, áðrenn tað verður sent út til ummælis.

Tórshavn, 09. juni 2023

Bjarni Kárason Petersen
landsstýrismaður